Søren Christensen nýggjur ríkisumboðsmaður:

# - Eg skilji føroying

**Søren Christensen, ið tekur við starvinum sum ríkisumboð 1. august, er ein royndur maður - bæði tá tað kemur til norðurlendskt samstarv og føroysk viðurskifti. Tað metur hann vera ein týdningarmiklan fyrimun, nú hann skal virka sum millumlið millum Føroyar og Danmark.**

SAMRØÐA
*Marjun Dalsgaard*

Um fáar dagar stígur nýggi ríkisumboðsmaðurin á land í Føroyum. Við sær hevur hann drúgvar royndir bæði úr Føroyum, øðrum norðurlondum og fjarskotnum londum uttan úr heimi.

At kenna og skilja føroyska mentan er avgerandi í starvinum sum millumliður millum Føroyar og Danmark, og júst hetta metir Søren Christensen vera sín størsta fyrimun.

Eftir nógvum árum í donsku fyrisitingini og sum aðalskrivari í Norðurlanda Ráðharrastovninum, kennir hann føroysku skipanina innanífrá. Hann var millum annað við til at gera bygnaðarbroytingarnar, ið fylgdu av nýggju stýrisskipanarlógini síðst í 90'unum, og sum aðalskrivari í Norðurlanda Ráðharrastovninum hevur hann verið við til at taka avgerðir um Norðurlandahúsið, eins og hann er við í arbeiðinum á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn.

Ítøkiligu royndirnar við Føroyum hava sum so onga beinleiðis ávirkan á hansara leiklut sum ríkisumboð - heldur eru tær við til at hjálpa honum at skilja føroyingar og føroyska mentan, sigur Søren Christensen millum annað í samrøðu við Sosialin í dag. Hann hevur í nógv ár javnan verið í Føroyum - tríggjar ferðir higartil í ár, og hann skilur sostatt eitt sindur av føroyskum, eins og hann hevur føroysk vinfólk.

- Lat okkum siga tað soleiðis: Eg dansaði føroyskan dans, áðrenn tú var fødd, sigur hann - helst fyri at vísa á, at hann ikki følir seg heilt sum útlending.

### Lurtar eftir tónleikinum

Hóast at - ella kanska serliga tí at - hann hevur havt nógv við Føroyar at gera í sínum starvi í donsku fyrisitingini, leggur Søren Christensen serligan dent á ikki at siga nakað, sum kann hava ein politiskan undirtóna. Hann hevur millum annað lært, at tað kann vera eitt viðkvæmt evni, tá danir siga sína hugsan um føroysk viðurskifti og ætlar tí at halda sínar meiningar fyri seg sjálvan.

- Eg ætli mær at lurta eftir tónleikinum, hvørki at stjórna orkestrinum ella at spæla við í tí, sigur hann sum tað fyrsta í samrøðuni um nýggja starvið. Hann leggur tó aftrat, at um nakar er áhugaður at tosa við hann um nøkur av teimum viðurskiftum, sum hann hevður royndir við ella biður um ráð, vil hann fegin vera til hjálpar.

- Mítt starv kann deilast í tríggjar súlur. Ein er tann reint fyristingarligi parturin, sum snýr seg um at veita føroyingum góða tænastu á teimum økjum, sum hoyra til ríkisumboðið, ein er at vera millumliðið, sum ger at tingini glíða eitt sindur lættari, og ein er at gera frágreiðingar til donsku stjórnina, greiðir Søren Christensen frá. Hann leggur serliga dent á tað týdningarmikla í at skilja føroyska mentan, tá hann skal senda frágreiðingar til Danmarkar um politisku støðuna, men eisini tá tað kemur til onnur meira fyrisitingarlig viðurskifti.





*Søren Christensen var millum annað við til at gera bygnaðarbroytingarnar síðst í 90'unum, sum fylgdu eftir nýggju stýrisskipanarlógini í Føroyum. Hetta merkir, at hann er betur førur fyri at skilja føroyingar og er bert ein fyrimunur í nýggja starvinum, sigur hann í samrøðu við Sosialin í dag.*
*Mynd Marjun Dalsgaard*

- Tá eg skal greiða frá politisku støðuni í Føroyum, er tað av týdningi, at eg dugi at seta meg ínn í, hvat ið tað er, sum gongur fyri seg - og eg haldi, at eg eri førur fyri tí - ikki bara tí eg havi eina langa fortíð í Norðurlendska Ráðharrastovninum, men tí eg havi starvast saman við nógvum føroyingum og havi nógvar royndir við at samstarva við fólki frá allari verðini, sigur Søren Christensen.

### Fyrimunur at hava ríkisumboð

Søren Christensen heldur, at tað heilt vist er ein fyrimunur at hava eitt ríkisumboð í Føroyum, so ikki ov nógvar misskiljingar standast millum londini, tí ein dani betur kann greiða dønum frá tí sum fer fram í Føroyum.